## VIÐMERKINGAR

# Høgni Hoydal - tilukku



**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*

Ólavsøkurøðan hjá samgonguni í ár rúmar hugsjónir. Stungið verður út í kortið av samgonguni.

Fullveldiskósin "breyt hálsin" viðgekk ein spakur Tjóðveldismaður á løgtingsins røðarapalli undir viðgerðini av røðuni. T.v.s. at Tjóðveldisfólk meira og minni heilhjartað viðganga, at fullveldi í veruleikanum er hálsbrotið og deytt. Í hvussu so er ímillum vanligar føroyingar.

Vit hava ídag brúk fyri eini HUGSJÓN IÐ HELDUR OG IKKI HEVUR BROTIÐ HÁLSIN. Tí var neyðugt við 2015 hugsjónini í ár.

Vit hava ídag ávísar fíggjarligar trupulleikar. Hesar trupulleikar høvdu vit ikki havt, um katastrofala samgonguskjalið ikki varð skrivað í 1998.

Alt tað sum blokkurin var niðurskorin við tá, tørva vit nú. Tað er ein prófvfastur veruleiki.

Leiðarin fyri andstøðuni hevði eina fullveldisvisión. Hana bløða vit fyri ídag. Var hendan fatala ætlan komin longur áleið, so høvdu vit kanska bløtt út sum tjóð.

Ein kundi taka hattin av fyri eldri Tjóðveldisfólkum. Sum søgdu nei til sess í Fólkatinginum. Tí teir kundu ikki undirleggja seg donsku grundlógina. Hesa lóg hevur Høgni Hoydal nú undirskrivað at hann við halda til minsta komma. Ein kann spyrja um tjóðveldishugsjónin nú er skift út við breyðpolitikk, har kassadamur í Føtex skulu gjalda løn til eina deyða hugsjón hjá Tjóðveldisformanninum. Hvar er hugsjónin í livir- tí har eru bert spurningar til hvønn Hanus og Janus. Ongin hugsjón er at sjá í Tjóðveldisflokkinum í dag.

Men vit í samgonguni hava so nakað annað at bjóða. Eina visón um einar Føroyar, har fólk kunnu mennast, liva og blóma.

Eitt orðatak sigur, at eitt býtt kann spyrja meira enn 10 vís kunnu svara. Tað tykist, sum hálsbrotna hugsjónin hjá Tjóðveldisflokkinum gevur flokkinum alstórar trupulleikar. Tí koma spurningarnir frá H Hoydal eins og kúluregn úr maskinbyrsu. Næstan líka skaðiligir eisini. Øll alment fólk í umsitingini bæði í Føroyum, Danmark, Ríkisumboði og Drotning mugu nýta meginpartin av síni løntu tíð, og meira enn tað, til at svara uppá hugsjónarleysu og meiningsleysu spurningarar, ið ikki hava til endamáls at fáa svar, men klandur og spjaðing.

Eg vildi ynskt, at Tjóðveldisformaðurin legði kósina um, so Tjóðveldisflokkurin meira luttók í at loysa fleiri av teimum stóru trupulleikum, ið teir sjálvir hava flota av bakkastokki. Men tað krevur rygg og ábyrgd.

Annars fari eg at ynskja Høgna Hoydal tilukku við enn einum heimsmeistaraheiti - at seta nógvar - og ofta meiningsleysar - spurningar.

Vit mugu viðganga, at tað eru fáir føroyingar, ið kunnu prýða seg við fleiri slíkum heitum. Mær vitandi er tað bert H Hoydal, ið hevur 2 heimsmeistaraheitir. Men helst koma fleiri.

Dreymir á Ovastevnu:

# Marinaðin í Nólsoy

**Michael Müller**

Vissuliga kann staðfestast, at gamla staðarnavnið í Nólsoy, Skipagriftin, nú aftur er komið til sín rætt. Tí í nábladnum, í niðurlagda flakavirkinum – Klivar, er nú føroya fysta, verunliga Marina opnað.

Saman við nólsoyingum kunnu nú havnamenn gleðast um tær framúr umstøður, sum smábátaeigararnir nú hava fingið. Aftan á samanleggingina av kommununum, er tað sjálvsagt, at Nólsoyarvík leggur rygg til eina hóskiliga bátahavn.

At fara allan teinin inn á Sund at pumpa bát og so at spara tann koyritúrin – tá er tað hugaligari at taka Rituna av Bursatanga um fjørðin til Nólsoyar. Tað man vera fáur bátaeigari kring Limfjørðin, sum hevur styttri leið til sítt bátapláss.

Nú víkin er so væl vard eftir at norðrara grótkastið er lagt út, man eingin ivast í, hvussu væl egnað plássið er til bæði summar og vetrarlegu. Fyrrverandi flakavirkið, Klivar, kemur at standa øllum bátaeigarum, ið hava hug til tess, at fáa innivist. Eins og at hava neyst í Havn, kemur tann tørvurin nú at verða nøktaður við tað, at einhvør bátaeigari kann fáa húsarúmd har í tilskilaðum hóskiligum rúmi at hava sína »marinu-útgerð« liggjandi.

Inni í stóru høllini ber til at fáa uppihald hjá báti, sum treingir til ábøtur, har helst skal vera turt og lýtt. Á keiplássinum undir stóra hálvtakinum, er pláss til eini 40 bátar, sum ikki hava fyri neyðini at standa inni, men klára seg við at fáa sínar ábøtur gjørdar úti, men undir turrum.

Úti í heimi er alstórur áhugi fyri hesari fyrstu og flottastu Marinaðini í Norðurhøvum. Og tá at kalla allar handverkaraditiónir: bátasmiðir, maskinsmiðir og málarir, er á staðnum, er upplagt at Nólsoyarvík fer at verða eitt fremsta ferðamál hjá nógvum fremmandafólki, sum hava hug at fara í: Víking! – og at fáa sínar ábøtur gjørdar á bát sín her, í einum av mest charmerandi umhvørvum í norður-atlantshavi. Afturat øllum teim gomlu húsunum, sum Kunningarstovan hevur at bjóða fólki, eru eisini kaffistova og skrivstovur á flakavirkinum innrættaði til at hýsa størri ferðaløgum.

Har Ove trein síni fyrstu spor, og sum síðani útviklaði seg til Ova-stevnuna, er nú ein international bátaolympiada. Úr Bretagne, Suðuroyggjum og Írlandi fara vit at uppliva henda fjálga stemmningin av eydnusælum siglarum, sum hava valt at halda summarfrítíðina í Nólsoy, skamt norðan fyri heitasta stað í Føroyum – Hósmøl.

# Tá stórmenni tala



**Súsanna Dam**

Mikukvøldið/hósdagin 10/11 august hevur Høgni Hoydal grein í Dimmalætting og Sosialinum, har hann sendir stóra tøkk til Edmund Joensen. Mær tykir, at allir føroyingar eiga at lesa greinina, tí hetta er kjarnin í øllum frælsisstríði hansara, og slíka mergjaða áskoðan unnast okkum sjáldan at fáa lut í. Her hevur einki minni enn ein rættur statsmaður ført pennin.

Síðani loyvi eg mær at siga, at tað er alt ov vánaligt at pressan ikki varpar ljós á tílík úrmælisavrik, sum áttu, at fingið okkum øll til at steðga á eina løtu og kanska gjørt upp við okkum sjálvi, antin hetta er framtíðin, ella???




# Ternan fer at sigla á Ovastevnu

Strandferðslan hevur nú veruliga gjørt nakað fyri at nøkta flutningstørvin millum Havnina og Nólsoy á Ovastevnu: Fyri at nøkta tørvin fer Ternan at sigla fyri Rituna

Talið á vitjandi á Ovastevnu er vaksið alsamt seinastu árini. Í fjør flutti Ritan yvir 1.600 fólk út til Nólsoyar, harav 1.200 fólk leygardagin. Ritan sigldi fullsett allan leygardagin, og stóð tað á hjá fólki at sleppa við.

Fyri at veita eina betri tænastu í ár er avgjørt, at Tern-an skal sigla fyri Rituna leygardagin. Ternan tekur 319 ferðafólk, meðan Ritan tekur 125 ferðafólk. Ternan siglir fyrsta túrin kl. 16 og siglir síðani annan hvønn tíma. Vísir tað seg at verða tørvur er á tí, siglir Ternan hvønn heilan tíma. Seinasti túrur hjá Ternuni úr Nólsoy er kl. 4:25 sunnumorgun. Síðani siglir Ritan aftur kl. 10 úr Havn.

Ferðaseðlar verða bert seldir við fráferð úr Havn. Kostnaðurin er 70 kr. fyri ferð aftur og fram.

Ferðaætlanin á Ovastevnu er at finna heimasíðuna hjá SL www.ssl.fo.

# Leiðslan á Ríkissjúkrahúsinum vitjar føroyska heilsuverkið

**HEILSUVERKIÐ**
*Tíðindaskriv*

Leiðslan á Ríkissjúkrahúsinum vendi sær á heysti 2004 til Almanna- og heilsumálaráðið við ynski um at koma á vitjan í Føroyum á vári 2005 til tess at kunna seg um tað føroyska heilsuverkið. Hetta fyri at kunna síggja, hvar Ríkissjúkrahúsið kann styrkja uppundir ta menning, sum fer fram innan heilsuøkið, eitt nú innan telemedisin.

Í summar hava umboð fyri Ríkissjúkrahúsið verið í Føroyum. Byrjað varð við at vitja Klaksvíkar sjúkrahús, har rundsýning var á sjúkrahúsinum og á ellisheiminum. Somuleiðis varð skipað fyri rundsýning á Landssjúkrahúsinum.

Undan vitjanini varð gjørt av, hvørjir fakligir fundir skuldu haldast. Fundir vóru m. a. um møguleikarnar at nýta telemedisin í Føroyum og at taka ein part av viðgerðini til fólk við sjúkuni cystiskari fibrosu til Føroya.

Telemedisin gevur møguleika fyri, at samskifti kann fara fram millum serfrøðingar á Landssjúkrahúsinum og serfrøðingar á Ríkissjúkrahúsinum gjøgnum hátøkni. Nýtslan av telemedisini kann soleiðis geva møguleika fyri, at ein tann tilsjón, ið annars bert kann gerast á Ríkissjúkrahúsinum, møguliga í framtíðini kann flytast til Føroya. Við nýtslu av telemedisi er eisini møguligt at fáa svar alt fyri eitt uppá royndir, ið læknar á teimum føroysku sjúkrahúsunum taka. Niðurstøðan á fundinum varð, at báðir partar skuldu hyggja eftir, hvørjir møguleikar eru á hesum øki.

Tað føroyska heilsuverkið hevur í eina tíð arbeitt við at fáa ein part av viðgerðini til fólk við cystiskari fibrosu til Føroya. Niðurstøðan her varð, at leiðslan fyri Ríkissjúkrahúsið skuldi kanna við serlæknar á økinum, hvørji krøv skulu setast fyri at kunna flyta ein part av tilsjónunum til Føroya. Um ætlanin verður framd, fer tað føroyska heilsuverkið at seta seg í samband við teir sjúklingar, sum hava hesa sjúku, til tess at finna útav, hvørjir hava áhuga í at fáa ein part av tilsjónunum framdar í Føroyum.

Fundur varð somuleiðis hildin um samstarvið millum partarnar sum heild.

Eftir vitjanina, hevur leiðslan á Ríkissjúkrahúsinum boðað frá, at eftir teirra meting er føroyska heilsuverkið framúr væl virkandi, og er fakliga á einum høgum støði.